# TFT útbúgving

Fundur fyri tey sum eru áhugað at læra til TFT-viðgerða (terapeut) verður í Sléttanesgøtu 5

**fríggjakv. 14. mai kl. 19.00**

Fundurin er ókeypis

*Avmarkað atgongd*

Tilmelding á tel. 318 821 ella við telduposti: sigmo@post.olivant.fo

Hjálpir móti strongd, tramaum, fobium, angist, tunglyndi, alkoholmisnýtslu royking og mongum øðrum.

www.tftdanmark.dk

# TFT fyrilestur

Fyrilestur um TFT-viðgerðarháttin verður í Sléttanesgøtu 5

**hósdagin 13. mai kl. 19.00**

Kostnaður kr. 150,-

*Avmarkað atgongd*

Tilmelding á tel. 318 821 ella við telduposti: sigmo@post.olivant.fo

Hjálpir móti strongd, tramaum, fobium, angist, tunglyndi, alkoholmisnýtslu royking og mongum øðrum.

www.tftdanmark.dk

# Leiðari søkist

til dagrøktina í Gøtu Kommunu. Í skipanini eru 4 dagrøktarar.
Arbeiðstíðin er 20 tímar um vikuna at byrja 1. august 2004.
Dagrøktararnir eru saman ein dag um vikuna í spælistovu frá kl. 7.30 til 17.15.

Umsøkjarar við námsfrøðiligari útbúgving ella royndum við arb. sum leiðari hava fyrimun. Um eingin námsfrøðingur søkir, verður ófaklært fólk sett fyribils íeitt ár.

Lønin er sambært sáttmála hjá Føroya Pedagogfelag.
Freistin at søkja er 1. juni 2004.

# Til Frítíðarskúlan søkist

**1 pedagogur** til arbeiðið 30 tímar um vikuna at byrja 9. august 2004.
**1 hjálparfólk** 25 tímar um vikuna at byrja 9. august 2004.
**1 avloysara** at byrja 9. august 2004
**1 vaskifólk** at byrja 16. august 2004

Í Frítíðarskúlanum eru 20 pláss.

Komandi skúlaár flytir frítíðarskúlin í leigaði hølir hjá Gøtu Arbeiðarafelag.

Um eingin pedagogur søkir, verður hjálparfólk fyribils sett í eitt ár.

Lønin er sambært sáttmála hjá Føroya Pedagogfelag.
Freistin at søkja er 1. juni 2004.

# Til Dagstovnin søkist

**1 pedagogur** til arbeiðið í barnagarðsstovu, 35 tímar um vikuna, har eru 21 pláss, at byrja 9. august 2004. Freistin at søkja er 1. juni 2004.

**1 avloysari** at byrja skjótast tilber. Freistin at søkja er 14. mai 2004.

Um eingin pedagogur søkir verður hjálparfólk sett fyribils.

Lønin er sambært sáttmála hjá Føroya Pedagogfelag.

Eru spurningar um størvini, ringt il Torgerð Hansen, leiðara á Dagstovninum, tlf. 442012 lokal 10.
Gøtu bygdarráð tekur sær rætt til frítt at velja ímillum umsóknirnar ella ongan at seta.

Umsóknir skulu sendast til
**Dagstovnin í Gøtu**
511 Gøtugjógv

# Álítandi fólk til Cafe Natúr



Vit søkja eftir einum røskum og arbeiðssomum fólki, sum dugir at arbeiða sjálvstøðugt.
Tú verður okkara álitisfólk, og fert at arbeiða skiftandi vaktir og um vikuskiftið.
Løn sambært avtalu.
Starvið verður sett skjótast gjørligt.
Skrivlig umsókn skal innan 15. mai sendast til platform@platform.fo ella til:

Café Natúr
Boks 3085
110 Tórshavn
Viðm. Umsókn

CAFÉ NATÚR
MAERSK AIR

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Læknaskrivari

Á **Medisinska deplinum** er starv sum læknaskrivari á starvsbrøki 0,85 leyst at søkja fyri læknaskrivara í farloyvi til setan 1. august 2004 ella eftir avtalu til og við 31. juli 2005.

**Førleikakrøv:**
- útbúgving sum læknaskrivari
- tænastusinni
- dugir at raðfesta arbeiðið, sum til tíðir er krevjandi
- góð samstarvsevni
- góður røkjuskapur
- teldukunnleiki

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Sæunn Ólavsdóttir Hansen, leiðsluskrivara, telefon 304500, lokal 6103 ella á e-post saunn@lsh.fo

Umsóknarfreistin er 25. mai 2004 kl. 12.00.

Skrivlig umsókn, merkt »umsókn til starv« við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skal sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
FO-100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«*

# Kunngerð

um framløgu av broytingum í byggisamtyktini.

Sambært løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954, um byggisamtykt og býarskipan við seinri broytingum verður við hesum gjørt kunnugt, at uppskot til serstaka byggisamtykt fyri býlingin í Koytu, øki A1 og A2 í Sands Kommunu verður lagt fram til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni frá 10. mai til 01. juni 2004.

Møgulig mótmøli skulu vera skrivlig og vera kommunustýrinum í hendi í seinasta lagi 10. august 2004.

**Sands kommuna**

# Handil til sølu

Um hóskandi boð fæst er handilin Hugflog og Kirkjutorgið í Klaksvík til sølu saman ella hvør sær.

**Áhugað kunnu ringja á tlf. 756559**

veitst tú ikki tað?
Sosialurin



## Føroya Sjómansskúli

# Skrivstovufólk/bókhaldari

**Starvið**
Í samband við, at eitt av okkara starvsfólkum fer í annað starv, er eitt nýskipað starv leyst at søkja sum skrivstovufólk/bókhaldari á Føroya Sjómansskúla.
Starvið er skipað sum sjálvstøðugt starv í fyrisitingardeildini.

**Høvuðsuppgávurnar eru m.a.:**
- Kontering, bókhald og eftirlit við rakstrarstøðum
- Luttaka í gerð av greiningum og langtíðarætlanum
- Málsviðgerð
- Vanligt skrivstovuarbeiði

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum m.a. at umsøkjarar hava:
- Eina fyri starvið viðkomandi útbúgving t.d. HH, merkonom ella javnbjóðis og/ella royndir á hesum fakøkinum
- Áhuga fyri fíggjarstýring og fyrisiting
- Fyrikomandi og góð samstarvsevnir
- Evnir at kunna arbeiða sjálvstøðugt, og eisini í bólkum
- Teld á brúkarastøði

**Vit bjóða**
- Eitt starv, har tú sjálv/sjálvur kanst vera við til at skapa starvið
- Starvið er spennandi við skiftandi uppgávum og við samskifti úteftir

Tú kemur at arbeiða í einum spennandi umhvørvi við skiftandi uppgávum í tøttum samstarvi við starvsfólkunum á Føroya Sjómansskúla.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið seinni fevnir um fyrisitingina á Føroya Sjómansskúla og á Maskinmeistaraskúlanum. Starvsøkið verður fyribils á Føroya Sjómansskúla.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum o.ø. skulu sendast til:

**Føroya Sjómansskúla**
Nóatún 2
Postboks 104
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 21. mai 2004.
Starvið verður at seta 1. juni 2004.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Dánjal J. Poulsen, stjóra á Føroya Sjómansskúla tlf. 357500

*Føroya Sjómansskúli er altjóða góðkendur útbúgvingarstovnur innan sjóvinnu.*
*Umframt skipara og skipsføraraútbúgvingina hevur skúlin eina skeiðsdeild, sum fyri tað mesta tekur sær av at eftirútbúgva skipsyvirmenn.*



Nú er summari í hondum, og tíð er at gera seg kláran til tað



Tilboð viku 20

1 stk. Blandimaskina 1/2 sekk
1 stk. Trillibøra
1 stk. Skupu
1 stk. Spann 20 L

Øll 4 stk. Bert kr. 2.995,-

Avmarkað nøgd

Handilin á kajuni
í Hvalvík • Tel. 422 394

sp/f Ó.K. HEILSØLA & MASKINUR

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Snarskivan

Snarskivan er avgreiðslan hjá Tórshavnar kommunu

Deildin er bindilið millum borgaran og tær tríggjar fyrisitingarnar: Miðfyrisitingina, Teknisku fyrisitingina og Trivnaðarfyrisitingina.

Arbeiðsøkið, ið Snarskivan røkir, er tænasta í breiðari merking til starvsfólk og borgara.

Snarskivan heldur til í snotiligum hølum í miðbýnum í Havn. Avgreiðslan er saman við postverkinum í gamla posthúsinum

www.torshavn.fo

## Starvsfólk við byggitekniskum kunnleika til Snarskivuna

Tekniska økið í Snarskivuni leitar eftir eldhugaðum starvsfólki.

Dámar tær at samskifta við onnur og ert tú opin og fyrikomandi, so hava vit eitt áhugavert starv til tín.

Vit kundu hugsað okkum, at tú hevur kunnleika til byggitekniska økið, ella hevur hug at ogna tær henda førleika, tá miðað verður ímóti, sum tíðin frálíður, at tú fært eina breiða vitan um økið.

Saman við starvsfólkunum í Snarskivuni, ið virka sum eitt 'team', hevur tú møguleika fyri avbjóðingum og fært høvi til at menna tænastuna til borgaran á tekniska økinum.

Ljóðar hetta áhugavert so send eina umsókn, og greið frá tínum royndum, ella tak eitt prát við okkum í Snarskivuni, um tú ivast. Tosa við Helgu ella Niels Una í Snarskivuni, ella Janus í Starvsfólkadeildini .

Starvið er fulltíðarstarv og verður sett sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya, lønarflokkur 3.

Umsóknin skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi 21. mai 2004.
Viðmerk "Snarskivan" á umsóknina.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Barnaansingin

Barnaansingin í Tórshavnar kommunu umfatar dagrøktarskipanina, 29 dagstovnar og 10 frítíðarskúlar við tilsamans 1.700 børnum í ansing.

**Býlingshúsið á Norðasta Horni**
Í býlingshúsinum ganga 49 børn. Stovnurin er skipaður við tveimum barnagarðsstovum og einari vøggustovu. Á stovninum eru 10 starvsfólk.

**Vøggustovan og barnagarðurin við Velbastaðvegin**
Á stovninum ganga 101 børn. Stovnurin er skipaður við trimum barnagarðsstovum við 20 børnum í hvørjari og fýra vøggustovum við 10 børnum í hvørjari.

www.torshavn.fo

## Barnaansingin í Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna søkir vegna:

**Býlingshúsið à Norðasta Horni eftir:**
- einum pedagogi til Hornastovan í vøggustovuni at byrja 1. juni 2004 ella eftir nærri avtalu.

Leiðari: Óli Midjord, tlf. 310905 / 310906
Granagøta 5
FO-100 Tórshavn

**Barnagarðurin við Velbastaðvegin eftir:**
- eftir tveimum pedagogum at arbeiða 35 tímar um vikuna í vøggustovuni at byrja 4. august 2004.
- einum pedagogi at arbeiða 30 tímar um vikuna í vøggustovuni at byrja 4. august 2004.
- tveimum pedagogum at arbeiða 40 tímar um vikuna á barnagarðinum at byrja 4. august 2004.

Leiðari: Mona R. Mohr, tlf. 314373
Velbastaðvegur 41
FO-100 Tórshavn

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til stovnsleiðaran ella til Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera stovninum í hendi í seinasta lagi mikudagin 26. mai 2004.

www.sosialurin.fo